LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyrritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VOLVO 760
Turbo intercooler árg. 89, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222985

TOPPSTYKKIÐ
til Toyota Dyna/Landcruiser o.a. til sølu.
Tlf. 449045 ella 283753 eftir kl. 17

NISSAN BLUEBIRD U11
árg. 85-86 ynskist til eykalutir, hevur tú ein, so ring
210560 ella 423572

FELGUR
Fýra Opel Kadett felgur 13" 700 kr.
Tlf. 210560 ella 423572

TIL SØLU
Fýra Ford Escort felgur 14" og útstoyt, tveir teir aftastu pottarnir til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 210560 ella 423572

DEILIR TIL SØLU
4-trins gearkassi til VW Transportara km 50.000 til sølu fyri 3.300 kr. Diesel pumpa 2500 o.a. dynamo, startari, koblingssylindari, kompl. kobling - nýggj, 1.000 kr. bíliga til sølu.
Tlf. 423572 ella 210560

FELGUR TIL SØLU
Fýra nýggjar felgur við píkadekkum til Peugeot 306 og 4 felgur uttan dekk til Nissan Sunny.
Tlf. 253490

TOYOTA HILUX 2.4 D
Nýsýnaður, trælast, bakhjólstrekk, árg. 86, til sølu fyri 18.000,-
Tlf. 220422

TIL SØLU
Mazda 323, sær gott út innan og uttan, ongin rustur og koyrir væl, árg. 85, var til sýn, fekk ongan kross.
Tlf. 252897

HYUNDAI SONATA 2.0
til sølu, árg. 11/96, koyrt uml. 65.000 km hevur el-rútar, el-spegl, ABS, air-bags, cd-spælara, sportfelgur o.s.fr.
Tlf. 221148

TIL SØLU
Ford Escort 1.8 I CLX stationcar, árg. 95, bert koyrt 70.000 km, til sølu fyri 70-80.000 kr. Bilurin er í sera góðum standi og væl røktur. Summardekk á sportsfelgum og vetrardekk á felgum fylgja við í keypinum. Um nakar veit um onkran, sum ætlar sær at flyta heim til Føroya og sum hevur ein bil við donskum nr.-plátum í sama prísklassa, eri eg áhugaður at býta um bil.
Tlf. 86969450 heima
Mobil tlf. 20896282

TOYOTA CELICA 2,0 GTI
til sølu. Árg. 88, 148.000 km, sýnaður 17/1-01, ongan kross. 15" sportsfelgur, el-spegl, el-rútar. Píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 254535

PÍKADEKK
Fýra 13" píkadekk á felgum bíliga til sølu.
Tlf. 219035, eftir kl. 16

FIAT FIORINI 1,7 DIESEL
Lítil »kassabilur«, árg. 92-93, koyrt í Týsklandi í nøkur ár, koyrt 125.000 km.
Tlf. 220744

TOYOTA COROLLA 1.6 GTI
Árg. 89, koyrt 150.000 km, lakeraður fyri 1 1/2 ári síðan. Bilurin hevur 15" alufelgur + pikadekk, Sony anlegg + forst. hát.
Tlf. 220744

BRIDGESTONE HEILÁRSDEKK
Dekkini eru spildurnýggj, óbrúkt, 175/64/14", til sølu fyri 1.300 kr.
Tlf. 220744

TIL SØLU
Citroën AX 14 TRS, árg. 89, til sølu.
Tlf. 313031, e. kl. 17

SPORTFELGUR TIL SØLU
Sportfelgur 195/15 R15 v/fýra holum til sølu.
Ring 223460 ella 422358

DEKK TIL SØLU
Tvey 2 mðr. gomul píkadekk á felgum og fýra 4 mðr. gomul summardekk á felgum (Pyrelli 155 x 13) bíliga til sølu. Dekkini eru sum nýggj.
Tlf. 312968

TOYOTA CARINA 1,8 GLI
árg. 88, til sølu fyri 9.500 kr.
Tlf. 210940

TIL SØLU
Tríggjar 13" felgur til Mitsubishi bíliga til sølu.
Tlf. 375186

TIL SØLU
Fýra originalar 15" hjólskálir til VW bíliga til sølu. Tlf. 375186
EYKALUTIR
til Daihatsu Charmant: baklyktir, forlyktir o.a.
Tlf. 375186

MERZEDES 1.9 D
aut. gear, cd-spælara, koyrt 160.000 km, org. sportfelgur, vælhildin.
Tlf. 221036

BILAR TIL SØLU
Toyota Camry sedan 1,8 DX, árg. 89. BMW 525 tds, árg. 95. BMW 525 tds, árg. 93. Volvo 440 1,9 TDI, árg. 94.
Spf. Úrvalsbilar
tlf. 444943 - 281943
FO-530 Fuglafjørður www.bilar.fo

YNSKIST
Er nakar, sum hevur ein motor til ein W Transportara til sølu.
Tlf. 373116 - 210060

VOLVO F6
til sølu sum eykalutir fyri 12.000 kr.
Tlf. 373116 - 210060

NISSAN PATROL 3,3 TD
árg. 88, sýnaður í 2000, til sølu. Sp/f Auto Import Lakk og plátuverkstaður og eykalutir.
Tlf. 421560 - 217778

NISSAN MICRA
árg. 88, til sølu sum eykalutir fyri 1.000 kr.
Tlf. 210347

OPEL KADET
til sølu sum eykalutir fyri 1.000 kr.
Tlf. 210347

MAZDA 626 2,0 LX
árg. 87, til sølu sum eykalutir fyri 1.000 kr.
Tlf. 210347

TIL SØLU
Hvítur Honda Civic 1.5i Vetec, árg. 96. Bilurin hevur el-rútar, spegl og sóltak, 15" sportsfelgur og fløguspælara. Bilurin hevur koyrt 54.000 km og er í sera góðum standi. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222610
ella 333112

4x4 VIÐ LAST
Nissan King Cab, árg. '87. Bilurin er í hampuligum standi, og sær sera gott út. Hevur breiðar felgur + CD-spælara.
Tlf. 222850

SAAB 900
frá 86, koyrt 170.000 km, sýnaður í august 2000, í sera góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 332278

TIL SØLU
Svartur Peugeot 306 1900 td frá 94 við tveimum hurðum til sølu. Bilurin hevur el-rútar, el-spegl, powerstýring, alu-felgur og nýtt og gott stereoanlegg við mini-disc spælara og cd-vekslara við 6 fløgum. Bilurin verður seldur við skaða.
Tlf. 254633

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 88 til sølu sum eykalutur.
Tlf. 448605

FELGUR TIL SØLU
Fýra felgur, ongantíð brúktar, passa til Nissan Almera til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 333574

VW GOLF 2 1,6
turbodiesel, árg. 86, hvítur, hevur sóltak, 190.000 km, sýnaður 02/00. Prísur 20.000 kr.
Tlf. 321178

MITSUBISHI GALANT 1,8 TD
sýnaður í des. 2000.
Tlf. 321168 - 211248

TOYOTA COROLLA
Árg. 87, til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 316171, kl. 17-18

DEKK TIL SØLU
2 stk. Good Year M+S 205/65 R 15 til sølu fyri 1200 kr.
Tlf 213404

YNSKIST
Eykalutir til Mitsubishi Galant 1,8 TD, árg. 89, ynskjast. T.d. toppstykki ella heilur bilur at brúka sum eykalutir.
Tlf. 423591
ella 219171

FORD ESCORT
Ford Escort diesel til sølu.
Tlf. 218540

FORD COURIER
Ford Courier Diesel til sølu.
Tlf. 218540

SPORTSFELGUR
15" sportsfelgur, 4 hol, við góðum dekkum, til sølu fyri 3000 kr. Píkadekk á felgum til Volvo bíliga til sølu (sum nýggj).
Tlf. 222220

FORD P100
diesel Hardtop, nýsýnaður, árg. 1991, til sølu.
Tlf. 441888

TIL SØLU
Tvey góð 15" heilársdekk fyri 250 kr. stk. og fýra stk. 15" hjólskálir til Peugeot fyri 150 kr. stk.
Tlf. 314161

VOLVO 245
st.car árg. 1984 til sølu fyri 8.500 kr.
Tlf. 216620

MAZDA 626
árg. 1984 til sølu, krevur ábøtur sum sveisa skermin innan høgrumegin og varmaapparat, koyrir gott, nógvir deilir fylgja við, søluprísur 3.-3.500 kr.
Tlf. 222446

FORD ESCORT VAN YNSKIST
Ein Ford Escort 1.4 Van kassabilur ynskist til keyps sum eykalutir, um nakar eigur ein, so vinarliga ring
tlf. 424283 ella 214283

VW PASSAT
árg. 87 í góðum standi til sølu.
Tlf. 252502 eftir kl. 16

FORD SIERRA
árg. 90, sær gott út, hevur sportfelgur, vel og spoylarar. 130.000 km, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 441405

MAZDA 626 GLX HB
árg. 85, krevur smærri ábøtur, uttan plátur til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 254396

MITSUBISHI GALANT 1.8 TD
árg. 90, sýnaður des. 2000, í sera góðum standi, til sølu fyri 48.000 kr.
Tlf. 315982
ella 282246

CITROEN BX 16
árg. 90, til sølu, góður motorur, heilt lítið rustaður. Krevur sbrt. sýni ábøtur fyri uml. 15.000 kr.
Tlf. 318269
ella 212173

FIAT SEICENTO 1.1
Fiat Seicento 1.1 Sport árg. 98, koyrt 17.000 km, heilársdekk fylgja við í keypinum. Nærri fæst at vita á tlf. 316490 eftir kl. 18.00

FORD SIERRA
Nýsýnaður Ford Sierra árg. 87 til sølu.
Tlf. 221365

SUZUKI GS 550
árg. 78 til sølu.
Tlf. 221365

NISSAN KINGKAB
2,5 turbo diesel, árg. 1995, til sølu.
Tlf. 332295 ella 212395

NISSAN PATROL
árg. 85, nýsýnaður til sølu.
Tlf 281032

YNSKIST
Fýra 14" píkadekk ynskjast til keyps.
Tlf. 221347

TIL SØLU
Fýra lítið brúkt Gislaved Nord Frost píkadekk, 165-80-13, til sølu.
Tlf. 221347

FIAT UNO
60 N, til sølu.
Tlf. 313784

TOYOTA HILUX 2 4D
til sølu, toppstykkið er brotið.
Tlf. 441238

EYKALUTIR TIL
Toyota Carina ST 171, árg. 88-91. Hurðar, bakrútur, síðurútar, startari, el rútavindara, drívaksil, tendring og spegl - H.
Tlf. 455843

OPEL ASCONA 1,6
Árg. 87, við skaða, verður seldur heilt biliga. Kom og sjeggj. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 375055

Amboð

KOMATSU
Vit hava á goymslu nýggjar og brúktar gravimaskinur. Á goymslu nú, nýggjar: 1 stk. Komatsu PC15 - R8 1700 kg brúktar: 2 stk. Komatsu PC10 - 6 2700 kg. 1 stk. Powerfab (eiturkoppur) KOMATSU,
tlf. 211649

SVEISIAPPARAT
Eitt 180 amp. sveisiapparat til elektrodu- & TIG sveising.
Tlf. 210181

VENJINGARAMBOÐ!
Hevur tú ein Orbitrek ið tú ikki brúkar, eru vit áhugað at keypa hann.
Tlf. 319782 ella 221241

GAFFILTRUKKUR TIL SØLU
Brúktur el-trukkur við løðara 80 volt, 3,5 t. Áhugað kunnu ringja
tlf. 254396

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST!
22 ára gomul genta søkir arbeiði aftaná arbeiðstíð. Alt uttan kiosk arbeiði!
Spyr eftir Johnhild, tlf. 217686

ARBEIÐI YNSKIST
Ungur maður, 24 ár, søkir arbeiði í Havn. Havi koyrikort.
Tlf. 314471

ARBEIÐI YNSKIST
13 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð, alt hevur áhuga.
Tlf. 457773
ella 253678

ARBEIÐI YNSKIST
Kvinna átekur sær at ansa børnum heilan ella hálvan dag. Áhugaði kunnu ringja.
Tlf. 448347

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

TILBOÐ YNSKIST
uppá liðugtgerð av túni og stoyping av garði.
Tlf. 216901 / 316901

ARBEIÐSMAÐUR
Hevur tú brúk fyri einum arbeiðsmanni???! Eg eri ein 20 ára gamal drongur, sum gjarna vil hava eitt ella annað arbeiði, so um tað er onkur, sum hevur brúk fyri mær, so er at ringja
Tlf. 251409 ella 317109

ARBEIÐI SØKIST
Ungur maður við koyrikorti til lastbil søkir arbeiði.
Tlf. 254501

FRISØR
Dámar tær væl at seta hár og leggja make up, so er hetta nakað fyri teg. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 316515 ella 311683 millum kl. 12-13 og aftaná kl. 19.00

Barnaansing

SØKT VERÐUR
eftir dagrøkt til 20-mánaðar gamla gentu, helst saman við øðrum børnum frá uml. kl. 9.00 - 16.00.
Tlf 213161

AU-PAIR SØKIST
Familja, 4 fólk, ynskja at fáa au pair-gentu at ansa eftir Andreu, 2 ár, og hjálpa Láru Kristinu, 6 ár, at koma í skúla. Vit búgva í Mosfellsbæ, 15 km frá miðbýnum í Reykjavík. Vit leita eftir barngóðari gentu, sum helst ikki er yngri enn 20 ár, hevur koyrikort og ikki roykir. Byrja 1. mars 2001 og eitt ár fram.
Tlf. +254 5527558 ella +3548986047

ER NAKAR
sum vil ansa eftir Magnusi, 8 mðr. gamal, frá kl. 8-12. Ger onki, um onnur børn eru. Vinarliga ring
Tlf. 318554,
Bodil Holm Jacobsen

SØKT VERÐUR
eftir kvinnu at ansa eftir 1 ára gomlu Guðrun frá 1. februar til 1. august 2001. Væntast kann, at ansingartíðirnar verða skiftandi. Áhugaðar kunnu ringja á
tlf. 314061

Í KEYPMANNAHAVN
fyrst í komandi ári til juli. Vit søkja eftir eini gentu/konu til at ansa eftir lítla Tóri 30 tímar um vikuna. Lønin er sambart avtalu við Københavns Kommune. Ert tú áhugað ella kennur tú onkran sum kundi havt áhuga so kunna tit ringja til okkum á tlf. 38 34 33 99

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur Brio vognur við babylift og puslitasku til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 361560

TIL SØLU
Koyristólur við galesju til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 314908

TIL SØLU
Brio Combi barnavognur og rimasong til sølu.
Tlf. 224826

YNSKIST
Søkt verður eftir avlongum tvíburðabarnavogni í hampuligum standi. Vinarliga ring
Tlf. 321988

BRIO BARNAVOGNUR
Sera væl viðfarin Brio barnavognur við tilhoyrandi lift, dýnu og fluguneti, myrkabláur við ternutum mynstri, til sølu fyri 2.800,- kr.
Tlf. 312056

BARNAVOGNUR
Myrkagrønur Odder barnavognur við stálkassa til sølu fyri uml. hálvan prís. Brúktur í 1 ár. Sera vælhildin. Sjáldsamt skap. Regnslag, setur, lift .a. fylgja við. Liggimát 90 cm.
Tlf. 424070

BARNAVOGNUR
Ljósagráur, leðurlook barnavognur til sølu fyri 1.500 kr. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 371887

BABYLIFT
Ljósablá, leðurlook babylift, sera væl viðfarin, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 371887

TIL SØLU
Weekend song til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 333574

SCANDIA KOYRISTÓLUR
Ljósagráur Scandia koyristólur við galesju til sølu fyri 900,- kr.
Tlf. 333574

BABYLYFT
Grøn leðurlook babylyft til sølu fyri 400,- kr.
Tlf. 333574

YNSKIST
Koyristólur við kalesju í góðum standi ynskist.
Tlf. 320325

Bátaútgerð

SNELLUR YNSKJAST
BJ 5000 snellur ynskjst til keyps.
Tlf. 286518

DEKSBÁTUR
við snellu- og línureiðskapi til sølu.
Tlf. 444429 - 444466

VÁGASNELLUR
Tríggjar automatiskar vágasnellur til sølu.
Tlf. 448114

BÁTUR YNSKIST
til várróðurin. Helst í góðum standi.
Tlf. 213447 - 423447

YNSKIST
Sabb motorur, 25-30 HK, ynskist til keyps. Aðrir motorar í somu stødd hava eisini okkara áhuga.
Tlf. 332235, kl. 18-19

TIL SØLU
ARONA motorur 45 HK sum eykalutur, bíliga til sølu, koyrt 4000 tímar.
Tlf. 424265

BÁTAMOTORUR
165 HK Volvo Penta bátamotorur við drev, í góðum standi, einans koyrt ca. 1500 tímar, verður seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 213666

BJARGINGARÚTGERÐ
Vestar, kransar, rakettir, bluss, sløkkiútgerð. Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

EKKOLOD – GPS
1 stk. ekkolod Eagle Supra I.D. Prísuppskot: kr. 2.500,- Garmin GPS 45 (berbarur) og monterast, prísuppskot: kr. 3.000,-
Tlf. 287904 ella 214304

4-MANNAFAR
4-mannafar ella annar bátur um somu stødd, úr glastrevju, uttan motor, ynskist til keyps.
Tlf. 333325

Bingo

GOTT BARNABINGO
verður í Høllini á Stórheyggi sunnudagin 4. februar kl. 16:00
Havnar Fimleikafelag Stuðladeildin

LOPPUMARKNAÐUR
Vit søknast eftir loppum til loppumarknaðin 4. februar. Kom út á Stórheygg 30.1. kl. 19.30 ella 1.2. kl. 18.00. Ella ring tlf. 319327 (Karina). Vit heinta fegin lutirnar.
Havnar Fimleikafelag

SUÐUROYINGAR
Rimmar flogbóltsbingo verður í skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 5. feb. kl. 19.00. Sum altid góðir vinningar, full pláta 400 kr. tó 6-12 spæl 600 kr. Á lutaseðli verður gávukort frá Samkeyp á 1500 kr. 1000 kr. av olju og nógv annað.
Eykaspæl verður eisini.
Flogbóltsdeildin TB

BINGO
verður í Kappróðrarneystinum 5.2. kl. 19.00, eykaspælið 600 kr. Øll eru vælkomin.
H.S.R.

GOTT BINGO
verður í VB-húsinum sunnudagin 4. febr. kl. 17.00.

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 15. februar kl. 19.00. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

Bøkur

HEVUR NAKAR
Fysikens Verden 1+2 at selja mær?
Ring 313275, Anna

ALFRØDI 1 OG 2
Er tað nakar, ið kann selja mær bøkurnar Alfrøði 1 og 2?
Tlf. 315385

NÓGVAR BØKUR
Frilesnaður, søga og romanir. Alt bíliga.
Tlf. 311915
og 220660

Burturm. /funnið

DAMU-UR FUNNIÐ
í handlinum »Hjá Eli«. Eigarin fær urið við at koma í handlin eftir tí.
Tlf. 313731

GLOYMDAR BRILLUR
Einar brillur gloymdar í gula bókahandli áðrenn jól.
P/f Hjalmar Jacobsens Bókahandil
Tlf. 311584

ER TAÐ NAKAR
sum av misgávum umborð á Trónda fyri ca. 14 døgum síðani hevur tikið ein beriposa við eini hvítari blusu, cowboybuksum og einum skóm. Gerið so væl at ringja
tlf. 361366

LYKLATYSSI BURTURMIST á vegastrekkinum Traðargøta 12-47 og Traðartún 7. Í lyklatyssinum eru billykil - 2 reyðir Rukolyklar, 1 grønur og 2 gráir.
Vinarliga ringið 312292

HEVUR NAKAR
funnið mína mappu, mist í SMS 22. des. koyrikort og onnur pappír í.
Vinarliga ring
tlf. 333038
ella 223084

HARRAUR
burturmist í Klaksvík 16. des. Finningarløn verður givin.
Tlf. 457258

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
22 ára gomul genta søkir íbúð í Tórshavn. Royki ikki og farið væl um.
Tlf. 217686 Johnhild

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Vit eru ein familja, (tvey vaksin, tvey børn) ið ynskja eini hús í Hvítanesi, Kaldbak, Kollafirði, Leynum ella í Kvívík til 1.3.01.
Tlf. 310623 ella 319826

HÚS YNSKJAST
til leigu í Klaksvík.
Tlf. 456829

ÍBÚÐ YNSKIST
til lesandi skjótast gjørligt. Vinarliga ring 225181

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Kanst tú hjálpa mær við eini íbúð í Keypmannahavnar umráðnum. (Eg standi uttan tak yvir høvdið eftir 1. apríl) leiga/framleiga í stytri ella longri tíð, alt hevur áhuga. Eg eri ein kvinna fyrst í 40'unum í føstum starvi, royki ikki og farið væl um. Ring til »Føroyahúsið«.
Tlf. 33231587 millum kl. 12-20 ella heima tlf. 38337750

HÚS Í VÁGI TIL SØLU
ella leigu.
Tlf. 373660 - 373680 - 223380

HJÆLP
Jeg søger en lejlighed, Jeg er 51 år, ikke ryger, rolig, helst i Klaksvík. Kan træffes på husholdningsskolen til 1. mars.
Tlf. 456192, Anne Marie

HÚS/ÍBÚÐ
Pedagogur og tímburmaður við trimum børnum, søkja hús/íbúð í Havn.
Tlf. 318758
ella 221656

GOTT GOYMSLUHØLI
til leigu í Havn.
Tlf. 321225

KØMUR TIL LEIGU
til friðarlig mannfólk, sum ikki roykja ella drekka.
Tlf. 312578

BÝLI Í KBH.
Friðarlig genta, mitt í 20'unum, ynskir íbúð ella kamar til leigu í Keypmannahavn skjótast tilber. Framleiga hevur eisini áhuga.
Tlf. 40961111 M.P.

ÍBÚÐ/KAMAR YNSKIST
Hevur nakar eina íbúð/kamar í Keypmannahavn, sum eg kann iga ella framleiga, skjótast gjørligt?
Tlf. 447794

LÍTIL HÚS/ÍBÚÐ
í Havn ella Kollafirði ynskist til leigu til ungt friðarligt par, roykja ikki og fara væl um. Hava fast arbeiði og rinda til tíðina. Vinarliga ring skjótast tilber á
tlf. 421136

ÍBÚÐ YNSKIST
Tilkomin, einsamøll kvinna ynskir íbúð í Havn. Hevur fast arbeiði og fer væl um. Um neyðugt hevur hon sjálv vaskimaskinu, komfýr og køli/frystiskáp.
Tlf. 421708, best fyrrapart

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð á Glyvrum til leigu frá 01.03.2001: Liggur við høvuðsvegin, hevur egna inngongd og parkering. Ikki roykjarar hava fyrimun.
Ring 0045-97836900

ÍBÚÐ YNSKIST
Familja ynskir íbúð ella hús í Havn ella nærhendis til leigu fyri ca. 4800 kr. uttan ljós og hita, skal helst hava 3 kømur. Bæði hava fast arbeiði.
Tlf. 328030

HÚS YNSKAST
Hús ynskjast til leigu í Havn ella nærhendis Havnini sum skjótast.
Tlf 004524873787

ÍBÚÐ
Eg eri ein mamma við einari 8 ára gamlari diddu. Vit ynskja eina íbuð ella eini lítil hús skjótast. Vit eru friðaligar og fara væl um.
Tlf. 310383

HÚS Í VÁGI
Um nóg høgt boð fæst, selji eg hús mítt í Lágabø.
Tlf. 373874 ella 289174

MAMMA
við trimum børnum søkir íbúð á Argjum.
Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill.mrk. 0169

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður ynskir íbúð 1. apríl 2001 í Tórshavn.
Vinarliga ring 316490 ella 253079, Gert

ÍBÚÐ YNSKIST
í Havn ella nærhendis til tvey vaksin og eitt barn, má hava 2-3 kømur.
Tlf. 216151 ella 316716

HJÁLP!!!
Vit eru eitt ungt par, ið søknast eftir eini íbúð í Havn fyri max 4.000 kr. um mðr. við ljós og hita. Eru friðarlig, hava fast starv og gjalda til tíðina.
Tlf. 251287

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par í 20-unum ið søknast eftir eini íbúð í høvuðsstaðarøkinum fyri max 4.000 kr. um mðr. við ljós og hita. Vit hava bæði fast starv, fara væl um og eru friðarlig.
Tlf. 321026

HJÁLP – HJÁLP
Vit eru eitt par við tveimum børnum, sum eru uppsødd til 1. feb. Vit ynskja at leiga lela at keypa hús í Klaksvík - kanst tú hjálpa?
Tlf. 457159
ella 220603

ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum søkja íbúð ella hús í Kollafirði, Leynum, Kvívík ella Hósvík sum skjótast.
Tlf. 283141
ella 421178

HAVA TYGUM
ein kjallara í Havn, sum eg kann innrætta til íbúð fyri síðan at leiga fyri eina tíð, saman við konu míni og okkara trimum børnum.
Vinarliga ring:
tlf. 318758, 221656, Anton Petur

ÍBÚÐ YNSKIST Á TOFTUM
ella nærhendis skjótast gjørligt til ein 25 ára gamlan mann, farið væl um havi fast starv.
Tlf. 252943

KAMAR/ÍBÚÐ Í LONDON
Eg søknast eftir bústaði í London frá fyrst í februar til hálvan apríl.
Vinarliga rint
tlf. 317130

KAMAR ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu, helst í eysturbýnum. Vinarliga ringið á
tlf. 220910
eftir kl. 16.00

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu frá 1. feb. 2001 til kvinnu fyrst í 40-unum.
Tlf. 254460

STÓRT VERILSI
til leigu v/ øllum hentleikum v/ atgongd til køk, bað, mynttelefon og vaskimaskinu. Leigari má ikki roykja. 5 min. gongd til Læraraskúlan.
Tlf. 313799

HÚS TIL LEIGU
Hús í Havn til leigu beinanvegin fyri 6.000 kr. um mðr. u/ ljós og hita. Húsini eru 120 fermetrar og standa í friðarligum umhvørvi.
Tlf. 321166 - 250883 - 250884

TIL SØLU/LEIGU
Sethús á Sevmýri til sølu.
Tlf. 371614
Att. Edith Jensen

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197 Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~debes
E-postur: debes@post.olivant.fo

Dansur

DANSIFELAGIÐ
»Dansið við« í Vági Ársaðalfundur verður týsdagin 13. februar kl. 19.00 á Verkstaðnum inni á Bakka. Um neyðugt verður eykaaðalfundur hildin beint aftaná. Skrá samb. lógina og møguliga avtøku av felagnum.
Nevndin

FRÁ VÁGA DANSIFELAG
Ársveitslan hjá Vága Dansifelag saman við sumbingum, verður í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági 3.2. kl. 20.00.
Nevndin

Dýr

TIL SØLU
Akvarium 200 L. - lampa við 2 rørum - spannpumpa til sølu fyri 3000 kr
Tlf 213404

TIL SØLU
Zebrafinkur og undulatar til sølu.
Tlf. 314434

FRENSUR HORVIN!
Reyður frensur (stórur) burturblivin á Berjabrekku. Hevur nakar sæð hann? Vinarliga siga frá á
tlf. 318633

KANIN/MARSVÍN
Eitt stórt búr til sølu. Tað er væl egnað til marsvín og til kaninir at hava inni um veturin, kr. 400,-
Tlf. 316813 eftir kl. 17, Katrin

YNSKIST
Hevur onkur eina bøgu at selja mær?
Tlf. 375289

FITTUR KETTLINGUR
reydligur á liti og reinligur. Kann avheintast av djóravini.
Tlf. 312085

KANINIR
Er nakar, sum hevur kaninungar at lata/selja mær. Búr kann fylgja við.
Tlf. 457722

KETTLINGAR
Tveir reinligir kettlingar (kettir) fáast við at avheinta, teir eru lagdir 12. okt. Mamman er hálv angora.
Tlf. 422497

KETTLINGUR
Fæst beinanvegin. Fitt og reinlig. Hon er fødd 04.11.2000.
Tlf. 313492/222131

KETTLINGAR
Kettlingar vera latnir djóravinum.
Tlf. 457654
ella 217430

KETTLINGUR
Ein sera fittur kettlingur, trilittur, 8 vikur, kann fáast.
Tlf. 214884